# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*



# RANGE




*Nýggjasti Range Rover Evogue*

## BILRADIO

Aktuel bilfíðindi við Maggi Gunnarsson

### Hósdagin 23. september kl. 16.10

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin 23. september verður samrøða við danska motorjournalistin Terkel Spangsbo frá Motormagasinet, sum vitjaði í Føroyum.
Í sambandi við at fyrrverandi starvsfólk hjá Wenzel Petersen savnast aftur leygardagin 25. september, verður ein samrøða við Hans Mortensen, sum arbeiddi í fyritøkuni í meira enn 50 ár.
Eisini verður ein eldrivin súkkla hjá MC-Søluni royndarkoyrd.


Terkel Spangsbo


Hans Mortensen


Anders Berg

## Lamborghini Gallardo nr. 10.000




*Lamborghini verksmiðjan hevur framleitt 10.000 Lamborghini Gallardo síðan 2003*

Lamborghini hátíðarhalda í hesum døgum, at teir hava framleitt 10.000 Lamborghini Gallardo síðan 2003.

Lamborghini eru italskir supersportbilar, sum kosta millum tríggjar og sjey milliónir at keypa á donskum nummarplátum.

Hetta er met, og tann Lamborghini sum er framleiddur í mest nøgdum nakrantíð, sigur Stephan Winkelmann, presidentur hjá Automobili Lamborghini í Italia.